3.-18. AUGUST
listastevna føroya art festival

Kapping at skriva handrit til útvarpsleik

Innbjóðing

INNGANGUR
Millum mest krevjandi sendingar í útvarpi, eru útvarpsleikir. Soleiðis er ikki bara her hjá okkum, men kring allan knøttin. Av røttum kann sigast, at útvarpsleikur, tá hann er bestur, er útvarp á hægsta stigi. Hinvegin er útvarpsleikur krevjandi at gera, bæði í tilgerð og fígging. Til at stuðla uppundir, at nýggir útvarpsleikir verða gjørdir, lýsir Listastevna Føroya við hesum til kapping at skriva handrit til føroyskan útvarpsleik.

ENDAMÁL
Endamálið við kappingini er at fáa til vega nýggj handrit til útvarpsleikir at brúka í Útvarpi Føroya. Handritini skulu verða soleiðis, at tey sum liðug útvarpssending kunnu geva lurtarum listarligar upplivingar, sum eisini lýsa umstøður og kenslur í okkara samtíð. Handritið til útvarpsleik kann eisini viðgera evni, ið hava týdning fyri okkum ídag.

TREYTIR
Dentur verður lagdur á, at handritið til nýggjan føroyskan útvarpsleik endurspeglar nútíðarsamfelagið. Handritið skal vera til leik, sum varir 45 – 50 minuttir í útvarpi. Hetta svarar vanliga til 20 – 25 síður. Leikararnir skulu vera í mesta lagi 8 í tali. Handritið, sum skal verða klárt hjá teknisku framleiðslu útvarpsins at seta í verk, skal vera skrivað á føroyskum máli. Dómsnevndin hevur rætt til ikki at lata virðislønina, heldur hon tey innkomnu handritini ikki verða virðislønarverd.

VIRÐISLØN
Latin verður ein virðisløn til vinnandi handritið.
Virðislønin er 50.000 kr.
Vinnandi útvarpsleikurin verður sendur í Útvarpi Føroya, sama dagin sum Listastevna Føroya byrjar, leygardagin hin 3. august 2002. Útvarpið sendir harumframt eitt úrval av innkomnu handritinum. Eftir galdandi reglum samsýnir Útvarpið teimum, sum senda inn handrit, og har útvarpsleikur spyrst burturúr.

DÓMSNEVND
Til at viðgera tey innsendu handritini er ein dómsnevnd sett.
Í nevndini eru: Heðin M. Klein, Vár Jacobsen, Høgni Joensen og Eyðun Johannesen .

INNLATING
Handritið til nýggjan føroyskan útvarpsleik skal latast dulnevnt við frámerki. Saman við handritinum skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan og við navnaseðli í, sum sigur, hvør ið hevur skrivað. Handritið skal vera latið inn í seinasta lagi hin 12. mars 2002 og sendast Listastevnu Føroya.

Listastevna Føroya
Norðurlandahúsið
Norðari Ringvegur
Postsmoga 1260
110 Tórshavn

Frá Happadráttinum

Seinasti søludagur til 3. drátt er hósdagin 15. november



Størstu vinningar hesaferð:

| | |
|---|---|
| 1x | 250.000 kr. |
| 1x | 75.000 kr. |
| 1x | 60.000 kr. |
| 1x | 30.000 kr. |
| 2x | 25.000 kr. |
| 3x | 15.000 kr. |
| 7x | 10.000 kr. |
| 15x | 5.000 kr. |

Ágóðin av Happadráttinum: 1/3 fer til ÍSF og 2/3 fara í grunn, ætlað brekaðum

Eykavinningur 15.000 kr.

Hin Føroyski Happadrátturin

## VIÐMERKINGAR

# Valfundur á Giljanesi í 1998

**Sune Jacobsen**



Á valfundi á Giljanesi fyri valið á vári 1998 vóru øll valevni samd um, at tey vildu virka fyri hesum trimum niðan fyri nevndu málunum:

1. Halda fram við undirsjóvartunlinum
2. Royna at varðveita íløgustuðulin hjá nýggju ísfiskatrolarunum
3. Fáa gongd á útbyggingina av flogvøllinum

Tey bæði fyrst nevndu málini skulu ikki verða viðgjørd í hesum greinastubba, men harafturímóti er ætlanin at lýsa flogvallarmálið, sum ongan góðan hevur átt síðstu fýra árini.

Undirritaði umboðaði Vága valdømi á tingi í tíðarskeiðnum frá 1994 - 1998. Ì hesum tíðarskeiði royndi eg dagliga at tosa við Sámal Petur ì Grund, sum tá var ferðslumálaráðharri, at skunda undir útbygging av flogvøllinum í Vágum.

**Danir vilja útbyggja**

Hetta dagliga sambandið okkara millum gav úrslit, tí so tíðliga sum í 1996 samdust landsstýrið og danska ferðslumálaráðið um at seta eina nevnd, sum fekk arbeiðssetningin at kanna møguleikarnar fyri at betra lendingarhjálpitólini og at útbyggja flogvøllin. Nevndin legðist ikki á boðini, og í 1997 varð glíðibreytarútgerð roynderkoyrd á flogvøllinum, og vísti kanningin, at glíðibreytin royndist nøktandi.

Nevndin kom til ta niðurstøðu, at vøllurin átti at verið longdur við 200 m. og glíðibreytin átti at verið sett upp. Kostnaðurin av hesum íløgum varð mettur til umleið 160 mió. Kr.

Løgmaður, Edmund Joensen, sum tá umsat samferðslumál, legði seg ikki á boðini frá nevndini, og heitti í februar 1998 á danska ferðslumálaráðharran um at framja nevndu útbygging.

Hesa frágreiðing gav undirritaði valevnum fyri allar politiskar flokkar í lærararúminum à Giljanesi á vári 1998, og tí var semja millum allar flokkar at boða frá á valfundinum seinni, at teir vildu virka fyri, at danska ferðslumálaráðið fór undir umrøddu útbygging.

**Sabotera flogvøllin**

Men hvat hendi? Fólkafloksmaðurin Jørgen Niclasen varð valdur á ting at umboða Vága valdømi. Samgonguskjalið verður almannakunngjørt, og í tí stendur, at samgongan ætlar at yvirtaka øll málsøki. Sami maður, sum høgt og heilagt í aulini á Giljanesi lovaði, at hann vildi virka fyri, at danska ferðslumálaráðið skuldi útbyggja flogvøllin, sabuterar málið fáar dagar eftir við at siga, at vit vilja yvirtaka flogvøllin. Hetta svarar til, at konan sigur við mannin, at eg ætli at blaka teg á dyr og skiljast um stutta tíð, men fyrst ætlaði eg, at tú skuldi gjalda fyri eina stóra umbygging av húsinum, sum eg aftaná ætli at eiga sjálv. Teir flestu menn høvdu sagt: " Nei, góða, tað geri eg ikki", og tað sama segði danska ferðslumálaráðið.

Og ikki nokk við tí. Landsstýrið hevur ein almennan starvsfólkapolitikk, sum sigur, at starvsfólkið skal verða kunnað og hoyrt, um broytingar verða gjørdar í teirra starvsviðurskiftum. Hava Jóanis Nielsen og Jørgen Niclasen spurt starvsfólkið á flogvøllinum, um tey eru samd í teirri ætlan, sum landsstýrið hevur?

Umframt alt hetta hava m.a. Jørgen og Jóanis avskrivað slakar 400 mió.kr. av blokkinum fyri komandi ár. Hesar 400 mió.kr. kundu verið brúktar til at útbygt flogvøllin við og komið hálva leið við undirsjóvarttunlinum til Klaksvíkar, bara eftir einum ári. Og havt hava teir so avsett í hesum valskeiði til flogvøllin? Ikki eina einastu krónu.

**Fólkaflokkurin = Tjóðveldisflokkin**

Vágafólk hava ein møguleika, og hann verður týsdagin 20. november. Tað kann verða okkara fólkaatkøða, sum vit vórðu snýtt fyri. Orsakað av danska valinum verður flogvøllurin ikki yvirtikin í bræði, og blokkurin er bert lækkaður fyri árið 2001.

Geva vit til kennar, at hetta ganga vit ikki við til, so kunnu mist rættindi kanska bjargast aftur, men følir samgongan, at hon hevur stuðul í fólkinum, ja, so halda teir bara fram við somu kós, og hana kenna vit. Eg skal bara hava fýra ár saman við Tjóðveldisflokkinum aftrat, so er sjálvstýrið í húsi, segði Anfinn Kallsberg á landsfundi í Klaksvík í síðstu viku. Valið er tykkara.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg

Bilar
Nr. 216 • hósdagur • 8. november 2001 • 75. árg.

# Myndir frá Frankfurt Motorshow



Páll Danilelsen, frá bilasøluni hjá Meinhardt Arge, tók ein hóp av myndum á framsýningini í Frankfurt. Vit vísa her eitt lítið brot, við teimum bilum sum allarhelst høvdu hansara største áhuga



Nissan Micra sum prototypa. Tað ganga ivaleyst nøkur ár, til bilurin kemur á marknaðin

**Altjóða bilaframsýningin, Frankfurt Motorshow, ið læt upp fyri almenninginum tann 13. september, var nær við at blíva avlýst, eftir yvirgangsatsóknirnar í USA 11. september.**

**Hóast bumbuhóttanir móti framsýningini, vóru Páll Danielsen, frá bilasøluni hjá Meinhardt Arge og Rúnar Jacobsen, við á hesi framsýning**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Umleið túsund framsýnarar úr øllum heiminum, harav umleið 50 úr USA, vóru klárir at sýna fram nýggjastu bilmodellini, tá yvirgangsatsóknirnar vóru framdar í USA.

Samstundis komu bumbuhóttanir móti framsýningini, og 3000 skrivstovufólk máttu ríma úr einum háhúsi, beint við framsýningarhølini. Alt hetta hevði við sær at bilaframsýningin var nær við at blíva avlýst.

**Nógvar nýggjheitir**

Páll Danielsen sigur, at hann og Rúnar Jacobsen høvdu næstan mist mótið um at sleppa inn á hesa framsýning, ið teir vóru komnir heilt til Frankfurt at síggja.

Men tað eydnaðist teimum tó, og teir tóku nógvar góðar myndir. Tað er langt síðan at tað hava verið so nógvar nýggjheitir, á eini altjóða bilaframsýning, sum á hesari. Hóast nógvir spennandi konseptbilar vóru at síggja, var áhugin størstur fyri teimum vanligu familjubilunum.



Nýggjasti Nissan Primera sum stationcar. Samstarvið við Renault sæst aftur í nýggju Nissan modellunum



Peugeot 307 SW, er ein sera snøggur stationvognur. Hann er 10 cm longri enn sedanútgávan, og fæst eisini við sjey setrum